# LÍTLI HANDILIN GEVA VINNING

**HANDILIN - Eg fór út higar at passa uppá pápa mín, sum var vorðin gamal, og so ynskti eg bara at hava okkurt aftrat at gera. Og tá eingin handil var herúti, so fór eg bara undir hann, sigur Oddbjørg Jacobsen, sum seinastu fýra árini hevur havt handil í Svínoy. Handilin er opin millum klokkan 5 og 6, og tá báturin kemur. - Hóast handilin er lítil, eru umstøðurnar tær somu sum hjá teimum stóru: Ein má alla tíðina stremba eftir vinningi, sigur Oddbjørg handilskona.**




*- Um veturin havi eg ikki avskorið pálegg ella frukt. Tað eru kundarnir ov fáir til, sigur Oddbjørg Jacobsen, sum her avgreiðir dagsins fyrsta kunda, ta 87 ára gomlu Elisabeth Jacobsen*

Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Svínoy:** - Áh, hevur tú ikki minni? Er ikki ein eitt-króna í mappuni? So sleppur tú frá at seta á hundrakrónuseðilin.

Ein eldri kona, tann 87 ára gamla Elisabeth Jacobsen er farin til handils henda fyrrapartin.

Hon hevur brúk fyri onkrum av tí sum hoyrir til húsarhaldið. Hóast hon er einsamøll í húsi, er neyðugt at fara til handils við jøvnum millum.

Millum tingini, ið hon keypir er mjólk, mjøl og steikimargarin. Í dag er eingin kø við diskin, so tað er skjótt at Oddbjørg avgreiðir dagsins fyrsta kunda.

Løtu seinni fer Elisabeth væl nøgd útaftur. Hon veit, at um eina løtu kemur Oddbjørg á gátt hjá henni.

## » Her »sleppur« eingin bara at keypa. Eitt prát fylgir eisini við prísinum

- Ja, eg arbeiði eisini um heimahjálp herúti, sigur Oddbjørg.

- Eg fekk akkurát eitt sindur av tógvi við bátinum. Tá eg havi fingið tað uppá pláss, fari eg oman til hana. Hon býr beint herniðri, greiðir hon frá.

### Bíleggja

Tað var tann tíð, tá handil var her í bygdini, og mundi bygdarfólkið vera sera fegið um tað.

Tá tað so brádliga hendi, at eingin handil var, høvdu fólk ikki annað í at velja, enn at bíleggja vørurnar frá handilsfyritøkum aðrastaðni, tey flestu helst úr Klaksvík.

Men hetta var ikki altíð so lætt. Tí um ein hevði gloymt at bílagt okkurt smáting, so var ikki annað at gera enn at bíða til næstu ferð, høvið var til bíleggingar.

Fyri fýra árum síðani avgjørdi Oddbjørg so at lata upp handilin í heimi sínum ið liggur Um Eiði 16, sum tað eitur herúti.

- Eg haldi, at fólk eru bara fegin um at hava ein handil her í bygdini, sigur hon.

### Tað almindiliga

Handil hjá Oddbjørg telist ikki millum teir størstu, men hevur kortini tað úrvalið sum ein vanliga brúkar í húsarhaldinum.

Avgreiðslan fer fram, eins og hon gjørdi áður í handlunum kring landið: Tú kemur fram til diskin; biður